# TILTØK

**Gudstænastur**
**14. sunnudag e. trinitatis**
*Vesturkirkjan:* kl. 11 Heri Joensen
*Havnar kirkja:* kl. 11 Sonja Klein
*Argja kirkja:* kl. 11 altarg., Bergur D. Joensen
*Kirkjubøur:* kl. 12.30 Bergur D. Joensen
*Nólsoy:* kl. 12 Sverri Steinhólm
*Sørvágur:* kl. 11 David Johannesen
*Miðvágur:* kl. 11 Inga Poulsen Dam
*Klaksvík:* kl. 11 lestur
*Svínoy:* kl. 12 Elsa Funding
*Gjógv:* kl. 12 messa, Emil Olsen
*Elduvík:* kl. 12 Uni Næss
*Hvalvík:* kl. 12 Mogens tilsted Christensen
*Haldarsvík:* kl. 11 Marjun Bæk. (Blásikvartett úr Musikkskúlanum spælir undir)
*Glyvrar:* kl. 11 Martin R. Jacobsen
*Skúvoy:* kl. 12, altarg., Jákup Reinert Hansen
*Leiti:* kl. 12 Patrick de Neergaard
*Fámjin:* kl. 11,
*Øravík:* kl. 12.15 Jónsvein Bech
*Sandvík:* kl. 11,
*Hvalba:* kl. 12.30 Ólavur Rasmussen

**Sjómanskvinnuringurin í Havn**
kemur saman á Sjómansheiminum mánadagin kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**KFUM og KFUK í Havn**
Fríggjadagin 17. til sunnudagin 19. sept. fara vit á kvinnulegu í Klaksvíkar Sjómansheimi, allar kvinnur er vælkomnar at vera við. Tilmelding er neyðug á tlf. 311928 ella 211824 í seinasta lagi 14. sept.
Mánadagin 13. kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Jenny Lydersen og Selmar Jacobsen.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing. Kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og kl. 12 verður eisini møti, har David Peckham úr Onglandi talar.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Sjónvarpsmøti saman við Evangeliihúsinum – Tummas Jacobsen talar, kl. 11.50 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Egin og Maritu Henriksen.
Mánadagin kl. 20 Felags bøn í Meinigheitini í Hoyvík.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067. Telefonin svarar mán-frí frá kl. 8-16.
www.filadelfia.fo

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli í Býlingshúsinum á Norðasta Horni, kl. 18 Møti í Missiónshúsinum v/ Jústines Poulsen.

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Tuomo Vimpari, prestur í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ Jóhan P. Johannesen, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20 Felags bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bøn.
Lega verður við Gjógv í døgunum 1.-3. okt.

**Frá Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Lívdin**
*Í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 á familjumøtinum talar Jógvan Zachariassen um evnið »Náði - partur 1«. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar Absalon Áargarð um evnið »Hirðatænstuna - partur 1«. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtinum.
Sunnudagsskúli kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
www.livdin.fo

**Frelsunarherurin, Tórsgøta 19**
Sunnudagin kl. 11 Møti har Toril W. Olsen talar, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18 Møti har Sámal Jákup Joensen talar.
Mánadagin kl. 17 Smáskótar, kl. 18 stórir skótar.

**Sjómanskvinnuringurin á Argjum**
kemur saman mánakvøldið 13. sept. kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Niels Jacob Nielsen.

**Kirkju- og Missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin kl. 19 Møti v/ Jan Johannesen, Miðvágur.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.
**Vestmanna Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli. Onki møti vegna vikuskiftismøti í Kollafirði.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ breyðbróting við Eiler Johannesen. Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

**Miðvágs Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti í missiónshúskjallaranum. Hjartaliga vælkomin.

**Zion, Kollafjørður**
Ungdómsmøtini byrja aftur leygarkvøldið kl. 20, ung úr Havn luttaka. Drekkamuður verður aftaná. Øll eru vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 AWAKE, við ungdómsleiðsluni.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Paula Høj. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Meinigheitshúsið á Skála**
í kvøld kl. 20 verður Ungdómsmøti. Øll eru vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli. Gávurnar fyri seinasta ár verða deildar út.
Kl. 19 verður bjóða til borðhald har tosað verður um arbeiði millum børn, ung, vaksin og eldri. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti. Húsbólkurin fyri ung møtir mánadagin kl. 20.

**Elim í Søldarfirði**
Sunnudagin kl. 12 Breyðbróting og sunnudagsskúli. Kl. 18 Samrøða við Jónas E. Larsen og ungdómar greiða frá luttøku á Teen Street. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tofta missiónshús**
Sunnudagin 12. september kl. 17 Familjumøti. Øll børn og vaksin eru vælkomin. Innsavnað verður. Boðið verður til drekkamunn aftaná. Orsakað av hesum verður eingin sunnudagsskúli kl. 14.

**Bønhúsið, Søldarfjørður**
Sunnudagsskúli sum vant kl. 13.30. Á møtinum sunnukvøldið kl. 18 talar Marius Jacobsen, Leirvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, har Vagn Foldbo talar. Ragnhard verður settur í starv. Drekkamuður aftaná.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 18 Sang- og vitnimøti. Ungdómsmøti kl. 21.
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími.

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 18 Møti.

**Soli Deo Gloria**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Jógvan Lamhauge og øðrum.

**KFUM & K, Klaksvík**
Sunudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Karl Hendriksen, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Viðareiði**
Í kvøld Ungdómsmøti við luttøku úr KFUM og K. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl 18 Møti v/ Karl og Elidu Kenning. Bønarmøti hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti. Bønarmøti hálvan tíma undan møtinum. Niels E. Olsen talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.


WWW.SMYRIL-LINE.COM



## Sølufólk til farmadeildina

**Vit søkja eftir sølufólki til farmadeildina.**

Farmadeildin er ein deild hjá Smyril Line, ið heldur til í pakkhúsinum við Eystaru Bryggju.

**Arbeiðsuppgávur:**
Uppgávur tínar verða, umframt at troyta verandi og alternativar farmaflutningsmøguleikar, at ráðgeva, vegleiða og røkja samskiftið við viðskiftafólk okkara. Sum seljari fært tú eisini sum uppgávu at geva tilboð og skriva kontraktir.

**Førleikakrøv**
- At tú ert ein seljari við stórum **S**
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- Dugir at veita viðskiftafólki okkara holla vegleiðing
- Tænastuhugað/ur og góð samstarvsevni
- Tað er ein fyrimunur at hava royndir og útbúgving innan sølu

Vit bjóða eitt starv við stórum avbjóðingum. Mennandi arbeiðsumhvørvi og góðar starvsfelagar.
Løn sambært avtalu.
Umsókn við møguligum prógvum og CV skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 20. september og skulu stílast til:

*Smyril Line*
*Postsmoga 370*
*FO-110 Tórshavn*
*Att.: Heðin Joensen*
*ella við telduposti til: hedinj@smyril-line.fo*

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Heðin Joensen, leiðara á farmadeildini, á tlf. 34 59 62.



Eystara Bryggja · Postsboks 370
FO-110 Tórshavn · Tlf: 34 59 60
Fax: 34 59 52 · cargo@smyril-line.fo



EVNISDAGUR

Byggiharrasamtak Føroya og Føroya Handverksmeistarafelag skipa fyri

## Evnisdegi um útbjóðing

**mikudagin 15. september kl. 8 - 18 á Hotel Føroyum fyri byggiharrum, arbeiðstakarum, ráðgevum, advokatum og øðrum áhugaðum.**

Skal verandi lisitatiónslóg endurskoðast?
Hvat inniheldur nýggja danska lógin "Tilbudsindhentningsloven"?
Hvørjir fyrimunir og vansar eru við henni?
Framløgur og kjak um praktiskar royndir v.m.

**Fyrilestrahaldarar:**
Oyvindur Brimnes, Byggiharrasamtak Føroya
Hans Lykke Hansen, Viltoft & Høberg-Petersen
Peter Andersen, Håndværksrådet
Mette Slott, DR-byen, Partneringsudvalget
Chico Sandbæk, Kuben, Rammebetingelsesudvalget
Peter Dethlefsen, Konkurrencestyrelsen

Kostnaður fyri hvønn: kr. 2.000,00 íroknað døgurða v.m.

Tilmelding í seinasta lagi mánadagin, tann 13. september 2004 hjá:

Byggiharrasamtak Føroya, c/o Landsverk, Telefon: 311 333
Teldupostur: kristian@lv.fo, Konto nr. 164.322.5 í Føroya Banka
ella á www.industry.fo. Konto nr. 156.933.5 í Føroya Banka,

Tilmeldingin er endaliga skrásett, tá goldið er.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*




# TILTØK

**Missiónshúsið í Vági**
Á sunnudagsskúlanum sunnudagin kl. 14 luttaka Thurid og Snorri Brend, trúboðarar í Mali. Á møtinum kl. 18 greiða tey bæði frá radio- og missiónsarbeiðinum millum fulani-fólkið í Mali. Innsavnað verður til missiónsarbeiðið. Øll eru vælkomin.

**Zion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Læraranna Missións Felag**
LMF-stevnan í ár verður á Hellunum leygardagin 25. sept. Byrjað verður kl. 9.00.

**Samkoman Malta í DK**
Leygarkvøldið 11.9. kl. 19 verður evangel. fundur í Skolehjemmet, Sønderlandevej 28.
Sunnukvøldið 12.9. kl. 17 verður evangel. fundur í Staldgårdsgade 4, Vejle. Talarar Levi Joensen og aðrir.

## GULLBRÚDLEYP

Týsdagin 14. september kunnu hjúnini Ásla og Asaf Olsen, Søldafjørður halda gullbrúdleyp. Dagurin veðrur hildin saman við børnunum.

19. september hava Jórun og Petur Meinhard Jacobsen, Skipanes gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 14.00. Tey, ið vilja gleða gullbrúðarparið kunnu ringja nr. 441288, 448968 ella 449498 innan 11. september.

## BRÚDLEYP

Leygardagin 25. september giftast í Kvívíkar kirkju Áki Gaardbo Olsen, Vestmanna og Sóllind av Sondum Estbú, Sandur. Dagurin verður hldin í miðhøllini í Vestmanna skúla frá kl. 15.oo til kl. 19.00, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 9. oktober kl. 16.00 giftast í Kvívíkar kirkju Andrea á Rípuni, Klaksvík og Tórarinn Niclasen, Hvalba. Vælkomst verður í Glæmuni kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 10. september á tlf. 421505.

## 70 ÁR

Fríggjadagin 24. september verður Ingrid í Puntabyrgi 70 ár. Dagurin verður hildin á Hotel Øravík kl. 18.30 tann 25. september. Tey, sum ynskja at koma í føðingardag, skulu ringja til Nicolinu tlf. 372994 ella Petru tlf. 371558 innan 15. september.

Eftir fundin bjóða vit kaffi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 13. september*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Myndaveving á loftinum. Seyma fýrkantar saman til teppir
kl. 14-18 Kortspæl, landastrok, bobbspæl, telving, dart og onnur spøl
**Í vetur verður matgerð í Tilhaldinum undir kvøldskúlaskipanini hvønn miku- og fríggjadag frá kl. 10.-13.30 v/ Anne Grete Harlou, tilm. tlf. 316491**
*Týsdagin 14. september*
kl. 10-11.30 Vit syngja, Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Sverri Mortensen sigur frá um Argir
*Mikudagin 15. september*
kl. 10-12 Fyrireiking til døgurða
kl. 12 Døgurði – tilm. mánadag tlf. 316491
kl. 14 Túrur til Kvívíkar, Ívar Iversen. Tilm. 316491
*Hósdagin 16. september*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum
*Fríggjadagin 17. september*
kl. 10-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 12. september verður gongutúrur av Velbastað-Steinafjall-Havnardalar. Lættur túrur. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Bygdaleiðin fer frá Steinatúni kl. 10.30. Tilmelding.

**Gongutúrur úr Hvalba til Sandvíkar**
verður leygardagin 11. september. Bussur koyrir av Kunningarstovuni í Vági kl. 10.00 og av Kunningarstovuni á Tvøroyri kl. 10.30. Aftaná gongutúrin verður farið í Bónahúsini við Ánna í Sandvík har fæst kaffi og okkurt afturvið. Síðani verður koyrt við bussi úr Sandvík til ávikavist Kunningarstovurnar á Tvøroyri og í Vági. Tilmelding til túrin skal gerast á kunningarstovuni í Vági á tlf. 374342/284342 ella á kunningarstovuni á Tvøroyri tlf. 372480/284480 í seinasta lagi fríggjadagin kl. 16.00.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
byrjar aftur mikudagin 1. september til vanliga tíð. Opið er frá kl. 14.00-17.00. Drekkamuður er at fáa. Bløðini eru til taks.
*Mikudagin 15. sept.*
Vit fara ein dagstúr til Havnar. Farið verður úr Tilhaldinum kl. 10 og vit sigla við Teistanum kl. 10.30 av Skopun.
Døgurði verður etin á Sjómansheiminum kl. 11.30.
Kl. 13. vera vit á Fornminnissavninum í Hoyvík og aftaná verður farið íHoyvíksgarð. Túrurin kostar 150 kr. og neyðugt er at tekna seg til túrin í seinasta lagi mánadagin antin í Tilhaldinum ella á tlf. 361990.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Føroya Heimavirsfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**AA-fundir í Havn**
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00 Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Højsangen 2, v16: »Min elskede er min, og jeg er hans, han som vogter sin hjord blandt liljerne.«*

Optimal kærlighed er at kunne sige om den man elsker: »Min elskede er min, og jeg er hans…«. Når man siger således til sine omgivelser, så indikerer man, at man har et særdeles godt forhold til sin kæreste og evt. kommende ægtefælle.

Så er forlovelsen allerede godt i gang, må man nok sige.

Kærligheden mellem mennesker er en fantastisk drivkraft. Den unge kvinde i Højsangen sammenligner sin elskede med en gazelle i foråret, der kigger ind gennem vinduet i huset ind til den anden smukke gazelle i stalden. Den unge mand siger til sin kære smukke elskede kvinde : »Stå op, min elskede, kæreste og smukke jomfru, lad og gå ud den skønne blomstrende natur og nyde fjeld, eng og fossen!«

Den unge kvinde venter på den, som hun håber bliver hendes brudgom, som hun skal være brud for. Han er hurtig og elegant som en gazelle og frisk som en hjortekalv, der løber omkring og springer på marken blandt de smukke blomster.

Den unge kvinde er billedet på en del af os. Brudgommen kommer og henter sin tilkommende brud. Når han kommer i skyen hurtigere end lynet, elegant som gazellen og frisk som hjortekalven og opfordrer os til at stå op, så må vi have »olie på lamperne« og være pyntet og klar med det samme. For det sker hurtigt.

Alle vi, der er rede, når Herren kommer i skyen, er Kristi brud. Jesus Kristus er brudgommen. Og det kan ikke nytte noget, at vi sover dybt, når han kommer. Vi må være rede med det samme, for det sker i hast, og ingen ved, hvornår det sker. Men det sker. Derfor er er det godt, at vi hele tiden er parat og klar til at møde brudgommen og tage med ham.

Vi, som er bruden, skal selvfølgelig være pyntet flot og have olie på lampen og ikke sove, når vores elskede kommer og henter os.

Olien på lampen er troen på, at vores elskede Jesus Kristus er vores, og vi her hans.

Han vogter os, og den bedste kontakt vi kan have med ham er at læse Guds Ord i fællesskabet med andre og bede. At læse i Guds Ord i tro og bede i Ånd og sandhed er måden at gøre sig parat til at møde sin elskede brudgom Jesus Kristus.

Læs evt. hele kapitel 2 i Salomos Højsang.

Næste lørdag den 18. september 2004 andagt over 1. Peter 2, 19-20: v19 For det er tak værd, når man med Gud for øje tåler uforskyldte lidelser. v20 Det er ingen ros, at I tåler mishandling, når I fejler. Men hvis I tåler lidelser, når I gør det gode, så er det tak værd for Gud.

**Mogens Tilsted Christensen, Sognepræst**


HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




Leygardagin 11.09. kl. $21^{00}$
Leygardagin 11.09. kl. $23^{15}$
Sunnudagin 12.09. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 12.09. kl. $22^{45}$




**Við danskari talu – Billettprísur: 55,- kr.**
Leygardagin 11.09. kl. $17^{00}$
Leygardagin 11.09. kl. $18^{30}$
Sunnudagin 12.09. kl. $16^{30}$
Sunnudagin 12.09. kl. $18^{00}$




**Við enskari talu og donskum teksti – Billettprísur: 55,- kr.**
Leygardagin 11.09. kl. $19^{00}$
Leygardagin 11.09. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 12.09. kl. $18^{30}$
Sunnudagin 12.09. kl. $20^{00}$




Leygardagin 11.09. kl. $22^{45}$
Sunnudagin 12.09. kl. $22^{15}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**